# ... og føðingardagur






## Vágs Kommuna helt 4. oktober sín 100 ára dag og tiltøk vóru alla vikuna, frá sunnudegi 30. september til og við sunnudag 7. oktober

### 100 ár

**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo
Myndir: Finn Johannessen, D. Olsen o.o

Tað var av sonnum ein stórfingin skrá, ið varð borin í hvørt hús í Vági, har Vágs Kommuna boðaði frá í snotiligum faldara, at 100 ára haldið hjá Vágs Kommunu fór at fara fram eina heila viku, og alskyns tiltøk vóru á skránni.

So nógv tiltøk vóru, at tað er rúgvusmikið at greiða frá. Fleiri tiltøk vóru hvønn dagin og nóg mikið var at fara til. Sigast kann í stuttum, meðan vit lata myndirnar tala fyri seg, at vikan gekk ómetaliga væl, og tyktist skapa trivna og gleði, og ikki minst sást, at felagsandin enn livir manna millum, og at fólk fegin taka eina hond í, har á stendur, tá umrøður at skapa trivna og hugna.

Tríva vit leysliga í ymiskt úr skránni, so kunnu nevnast framsýningar av ymsum slag, bæði listarligar og siðsøguligar, sang- og fyrilestrakvøld, morgunsvimjing í heitum hyli hvønn morgun, kirkjukonsert, handan av føðingardagsgávu til borgararnar, ið var eitt spæliplláss, sjónleikur við børnum, fyrilestrur um vinnumøguleikar, tónleikacafé, spurnarkapping um Vágs søgu, alment morgunmatarborð við alskyns undirhaldi, so sum Bakkens Pjerrot, kappróður millum bátar úr Vági og av Tvøroyri, kvøldseta, dansur og mangt, mangt annað.

Tiltøkini, ið øll vóru ókeypis, eydnaðust sera væl, tykjast flest øll samd um, og øll tiltøk vórðu væl vitjað. At fólk úr øllum Føroyum vitjaðu og tóku lut, eydnaðist eisini væl. Eitt nú vitjaðu stór føroysk tónleikanøvn á kirkjukonsertini, vinnulívsfólk norðaneftir greiddu frá, og "bikarar" (motorsúkklur, blðm.) úr Havn vitjaðu og settu dám á og hugnaðu sær við eittnú grill- og sangløtu undir Stóra Pakkhúsi.

Ein vika, sum seint fer í gloymibókina, kom at enda í Vági, og Vágs Kommuna og botgararnir kunnu fegnast um 100 ára haldið, ið stóð í átta dagar, júst sum brúdleypini í ævintýrunum.





